# TÓRODDUR ER ONKI AT FLENNA AT

NÝGGJA SAVNIÐ HJÁ **TÓRODDI POULSEN** STENDUR AT BRESTA VIÐ 80 FRÁLÍKUM YRKINGUM, SUM NÆRUM ERU REINSAÐAR FYRI HANSARA **BERØMTA SPEISEMI**



**UMMÆLI**
Kinna Poulsen
kinna_poulsen@hotmail.com

Við tí óvæntað banala ella sjálvsagda heitinum *Útsýni* verða vit enn einaferð boðin inn í tað serstaka poetiska universið hjá Tóroddi Poulsen, sum hesaferð tykist at kalla reinsað fyri tað berømta speisemi, ið vit av røttum og eitt sindur av órøttum sambinda við høvundin.

Kanska er tað lættari at flenna enn at lata vera, og kanska er tað av hesi orsøk, at vit hava lyndi til at finna fram tær stuttligu orðingarnar í tekstum Tórodds og síðani meira ella minni ignorera rest. Tær spísku, speirekandi viðmerkingarnar eru jú greidliga gløggar og kennast tryggari at fyrihalda seg til enn tær álvarsligu eitt sindur neutralu staðfestingarnar, sum ikki líkjast yrkingum og sum tykjast merkiliga sakleysar á sama hátt sum heitið á nýggja yrkingarsavninum.

Við vanda fyri plagiering í mun til eina nokkso kenda negatión hjá einum øðrum av okkara frálíku yrkjarum, kundu vit nevnt hesar yrkingarnar hjá Tóroddi ósjálvhátíðarligar, ókeðiligar, óuppblástar og stak ófornar, tó at fleiri træðrir í nýggja savninum ganga aftur í tíðina, bæði til barndóm yrkjaraegsins og longur aftur til slupptíðina, sum vakra steinprentið við grønu sluppunum á bókapermuni eisini sipar til.

**Orðini**

Nýggja yrkingasavnið fevnir um áttati frálíkar yrkingar hjá tí produktiva Tóroddi Poulsen, ið nettupp ikki kann samanberast við eina vulkan, sum bæði eru fornar og sum arbeiða sjálvdan. Tóroddur situr ikki og bíðar eftir íblástrinum, men arbeiðir sum eitt modernað listafólk stútt og støðugt hvønn tann einasta dag við at skriva, syngja, tekna ella hvat nú hansara fjølbroyttu gávur gera hann føran fyri.

Byrjanaryrkingin er sum eitt slag av credo, ið staðfestir uttanveltaðu støðu yrkjarans í mun til samfelagið, staddur sum hann er omanfyri. Tónin er einsligur og afturlítandi, men treystur, tí yrkjara-egið er sum heild nøgt við útsýnið, ið byrjar á kvistinum og endar á fjørðinum í síðstu yrkingini »MEN EG HAVI ALTÍÐ DROYMT«.

Í hugaheimi Tórodd Poulsens er dreymurin týdningarmikil bæði sum surrealistisk kreativ fyrimynd og sum poetiskur metaforur. Umframt dreymin eru eisini onnur orð, ið ganga aftur í hesum yrkingum: bátur, slupp, skip, fjørður, fjøll, áir, blomstur, barndómur, kráka, klettar, beinagrind, skrokkur, deyði, yrking, orð, litir, mynd, bók, bókstavir, grøv, runa, trø, mold, morgunmold, moldarsmakkur, tankamold, sovna, nætur, ævigt, mjørki, rot, lík, máni, kirkjugarður, nætur, spøkilsi og eingil.

Tað er sjálvandi ikki ráðiligt at lesa yrkingar á henda hátt við kensluleysum sentimeturmáli og hesum ávarar yrkjarin eisini støðugt ímóti. »... feskvatnsyrkingar/sum trívast sum saltvatnsyrkingar/tá tær ikki vilja setast í bás...« (s.18 í *Útsýni*), men allíkavæl kunnu hesi orð nýtast í eini lýsing av yrkingaheimi Tórodd Poulsens, ið er



*Træðrir í nýggja savninum ganga aftur til slupptíðina, sum vakra steinprentið við grønu sluppunum á bókapermuni eisini sipar til*